## KÍ vann uttan dyst

Kvinnuliðið hjá KÍ, sum hevur vunnið FM seinastu sjey árini, slapp ikki á vøllin um vikuskiftið. Sambært skránni skuldi KÍ spæla ímóti NSÍ sunnudagin, men fyri einari viku síðani boðaði NSÍ frá, at felagið fekk ikki manna kvinnuliðið hetta vikuskiftið, tí so nógvir spælarar vóru burturstaddir. KÍ noktaði at flyta dystin, tí fundur í FSF fyrr í ár staðfesti, at kvinnudystirnir skulu spælast til tíðina. Endin var tí tann, at NSÍ møtti ikki til dystin í dag, og KÍ vann uttan dyst. NSÍ missir eisini heimavøllin til seinna dystin ímóti KÍ.

## B36 vann í Gøtu

Oddaliðið í kvinnukappingini, B36, spældi sunnudagin í Gøtu, og har fingu kvinnurnar úr Havn góða mótstøðu. Tá ið átta minuttir vóru eftir at spæla var støðan 1-1, men so eydnaðist tað B36 at skora sigursmálið og halda fast um oddastøðuna í deildini. AB og EB/Streymur spældu á Argjum, og hóast AB var á odda 2-0 í hálvleikinum, eydnaðist tað EB/Streymi at vinna 3-2. Hetta er fyrsti sigurin hjá EB/Streymi í kappingini í ár.

## Barthez í bardaga við fjeppara

Fyrrverandi Manchester United-málverjin, Fabien Barthez, er fyribils givin í sínum franska felagi, Nantes. Orsøkin er tann, at hann um vikuskiftið kom upp at táttast við ein fjeppara hjá liðnum. Tá ið hann eftir ein dyst skuldi fara til hús, stóðu fimm rúsaðir fjepparar frammanfyri bilin hjá fyrrverandi franska landsliðmálverjanum, soleiðis at hann ikki slapp at koyra. Hetta spann øði í Barthez, og hann fór upp at táttast við tann eina fjepparan. Tað er enn óvist, um Fabien Barthez bara skal køla niður, ella um hann veruliga er givin í felagnum.

## Barcelona á toppinum



FC Barcelona er í tøttum stríði við onnur feløg um spanska meistaraheitið í fótbólti. Um vikuskiftið hevur eitt umfar verið í La Liga, og eftir at Sevilla sunnudagin vann sín dyst og legði seg á odda í kappingini, var kravið til Barcelona ein sigur í dystinum sunnukvøldið. Og tað eydnaðist eisini Barcelona at vinna dystin ímóti Levante. Eitt mál kom í dystinum, og tað gjørdi Eto'o.

B36-AB 4-1 (2-0):

# Hesa ferð var B36 til reiðar

**Eftir tapið fyri AB í steypakappingini, tóktist B36 veruliga hava sett sær fyri at hevna eyðmýkingina**

*B36*

*AB*

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Dysturin í Gundadal var ikki meira enn sjey minuttir gamal, áðrenn tað mesta varð avgjørt. Tá hevði Hanus Thorleifsson tvær ferðir runnið seg ígjøgnum vinstra verjuborð hjá AB, og í báðum førum var Sylla til reiðar at umseta møguleikan til mál.

### Kortspæl

Og so gekk dysturin annars fyri tað nógva í drúgvari tómgongd. B36 megnaði ikki at halda leikferðini uppi, og tó at AB royndi at koma sær til møguleikar, so gjørdist talan ikki um nakrar stórar av slagnum.

Í róliga dystinum, sum á ongan hátt var hart spældur, hevði dómari gula kortið á lofti ikki færri enn 8 ferðir. Tvær ferðir av hesum var Kenneth Jacobsen móttakari, og tí mátti B36 spæla at kalla allan seinna hálvleik við 10 monnum.

Men hetta nervaði tó ikki B36 tað heilt nógva. Gaman í hevði AB nú bóltin nakað meira, men tað sjáldan, at teir av álvara hóttu málið. Og í hinum endanum hevði B36 framvegis bit í sínum álopsroyndum.

### Klassamunur

Tað eydnaðist teimum eisini í tveimum førum at økja um leiðsluna. Fyrru ferðina, tá Fróði Benjaminsen varð skumpaður í ryggin, tá hann skuldi stúta innlegg móti málinum. Og seinnu ferðina, tá Sylla skeyt sítt fyrsta hat-trick fyri B36, eftir at Alex Jose dos Santos hevði sent langt og neyvt inn um AB-verjuna, ið var fangað ov høgt uppi á vøllinum.

At AB í evstu løtu fekk minkað um munin, broytti ikkimyndina av, at B36 so ruddiliga fekk prógvað, at talan var um kiksara í steypakappingini. Munurin í mun til ta ferðina var tó, at B36 hesa ferð var til reiðar at spæla. Ein læra, sum helst ikki kann lærast nóg ofta.



*Við einum hat-trick var Sylla høvuðsmaðurin, tá B36 leygardagin vann trygt á AB. Júst Sylla var ikki tøkur, tá B36 tapti fyri AB í steypakappingini, men munurin á liðunum var tó meira enn bara tann eini maðurin.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Skjúttarnir til reiðar til Oyl

**Triðja og seinasta úttøkukappingin hjá bogaskjúttunum var um vikuskiftið**

BOGASKJÓTING
*tíðindaskriv*

Líkindini at skjóta vóru av teimum allar bestu á Svangaskarði. Við vóru 6 compound- og 12 recurve-skjúttar.

Bogaskjótideildin hevði ásett minstu krøv til skjúttarnar, har teir í trimum kappingum skuldu megna kravið minst eina ferð, samstundis sum tvær tær bestu kappingarnar samanlagt vóru grundarlag fyri kvalifisering.



*Bogaskjúttarnir hava ofta gjørt góð hál fyri Føroyar á Oyggjaleikum*

Við á hvørjum liði kunnu verða í mesta lagi 6 skjúttar – fýra menn og tvær kvinnur.

Krøvini vóru: kvinnur recurve 850 stig, menn recurve 1000 stig, kvinnur compound 1100 stig og menn compound 1200 stig.

Undan kappingini høvdu seks skjúttar kvalificerað seg og í kappingini leygardagin vóru trý pláss eftir at dystast um. Av tí, at bert ein kvinna skjýtur í compound, var eingin at fylla plássið, ið eftir var. Eitt pláss var eftir til menn compound, menn recurve og kvinnur recurve.

Enn einaferð vórðu fleiri føroysk og persónlig met sett. Annika Vang setti nýtt met á 30 metrum í recurve við , og tað sama gjørdi Absalon Hansen.

Eftir triðju kappingina eru endaligu liðini úttikin, og eru tey hesi:

Recurve: Hans Petur Højgaard, Absalon Hansen, Rógvi Mohr, Eirikur í Jákupsstovu, Annika Vang og Jastrid M. Jensen.

Compound: Jógvan Niclasen, Per Holm Andersen, Schandorff Vang og Sigrid Vang.

Umframt skjúttarnar verða tveir hjálparar við á ferðini til Rhodos, teir eru Jógvan Magnus Andreasen úr Vágaskotum og Rakul Dam úr Tambar.